## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 4 stig. Seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av eystri og regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur og sólglottar, men eisin ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi upp í hvassan vind av norði og ælingur, partvís kavi. Seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi ella av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

# Herðaklapp til Landssjúkrahúsið

**Tað er ofta tað negativa, sum kemur fram, tá talan er um Landssjúkrahúsið, men í dag fekk G4 – skurðdeildin – eitt herðaklapp frá einum sera væl nøgdum sjúklingi**

GÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Alt, sum vit ynskja at siga, kann rúmast í einum orði: Takk!

Soleiðis segði ein glaður gevari við starvsfólkið á G4 á Landssjúkrahúsinum í morgun.

Gevarin, sum vil verða ónevndur, var so nøgdur við viðferðina, sum hann og familjan høvdu fingið frá starvsfólkunum á G4 í vár, at hann gav deildini ein stress-less stól.

Í stuttari takkarrøðu greiddi gevarin frá, at tað var ikki av tilvild, at talan júst gjørdist um ein stress-less stól.

- Tað var hesa einu náttina, eg sat hjá dóttrini, at sjúkrarøktarfrøðingarnir høvdu serliga nógv um at vera og runnu serliga nógv. Tá var tað ein av sjúkrarøktarfrøðingunum ið nevndi, at tær høvdu ynskt sær ein stress-less stól, sum tær kundu tveitt seg í, tá ein løta var, men at tað var ein fíggjarligur spurningur, og enn høvdu ikki verið pengar til hetta, segði gevarin.

Elin Vitalis, deildarleiðari á G4, var sera fegin um gávuna.

- Hetta er ein góð kensla. Hetta er ein strævin deild at arbeiða á, og tað kennist sera væl at fáa at vita, at man ger ein mun, sigur Elin Vitalis.

Hon sigur, at eitt slíkt herðaklapp gevur áræði, motivatión og mót at halda fram.

- Starvsfólkið, sum arbeiðir her, vil gera ein mun, ikki bara her á G4, men á øllum Landssjúkrahúsinum. Vit vilja seta sjúklingin í fokus, sigur Elin Vitalis.

Deildarleiðarin sigur, at tað kemur ofta fyri, at sjúklingarnir vísa sína nøgd við Landssjúkrahúsinum.

- Tað er oftani, at vit fáa lagkøku, aðra køku ella kort frá sjúklingunum. Eisini fáa vit javnan kort frá avloysarum, sum eru her um sumrarnar, sigur Elin Vitalis.

Hon sigur, at tey ofta fáa at vita, at starvsfólkið er fitt og blítt og fyrikomandi, tá fólk verða innløgd, og at tað gevur eitt gott fyrsta inntrykk.

- Men tað skal vera rúm fyri tí negativa eisini. Um alt ikki hevur gingið eftir vild, ella tað er okkurt, sum vit kunnu gera betri, so skal tað eisini verða pláss fyri tí, sigur Elin Vitalis.

Men í dag var Landssjúkrahúsið og serliga G4 í fokus fyri tað positiva.



*Tey hava leingi ynskt sær ein stress-less stól á G4, og nú er ynskið uppfylt – av einum glaðum, ónevndum gevara*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 24 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 23 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Hetland grynnist.

**Komandi nátt:**
Hátrýstryggurin yvir Føroyum fer í landnyrðing. Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin við vindi og regni.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/10 kl. $06^{00}$ – 04/10 $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/09 kl. $06^{00}$ – 01/10 $06^{00}$.
Avfallið higartil í oktober: 169,1 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

28. september — Mánin longst frá jørðini
4. oktober — Fullmáni
11. o ktober — Seinna kvarter
13. oktober

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. okt | 10:11 | 22:38 | 09:11 | 21:38 | 09:26 | 21:53 | - | 12:11 | 00:45 | 13:11 | 08:26 | 20:53 | 07:26 | 19:53 | 10:26 | 22:53 | 11:26 | 23:53 | 09:56 | 22:23 | 11:11 | 23:38 |
| 9. okt | 11:05 | 23:32 | 10:05 | 22:32 | 10:20 | 22:47 | 00:38 | 13:05 | 01:38 | 14:05 | 09:20 | 21:47 | 08:20 | 20:47 | 11:20 | 23:47 | - | 12:20 | 10:50 | 23:17 | - | 12:05 |
| 10. okt | - | 12:00 | 11:00 | 23:42 | 11:15 | 23:57 | 01:32 | 14:00 | 02:32 | 15:00 | 10:15 | 22:57 | 09:15 | 21:57 | - | 12:15 | 00:47 | 13:15 | 11:45 | - | 00:32 | 13:00 |
| 11. okt | 00:42 | 13:23 | - | 12:23 | - | 12:38 | 02:42 | 15:23 | 03:42 | 16:23 | 11:38 | - | 10:38 | 23:18 | 00:57 | 13:38 | 01:57 | 14:38 | 00:27 | 13:08 | 01:42 | 14:23 |
| 12. okt | 02:03 | 14:43 | 01:03 | 13:43 | 01:18 | 13:58 | 04:03 | 16:43 | 05:03 | 17:43 | 00:18 | 12:58 | 11:58 | - | 02:18 | 14:58 | 03:18 | 15:58 | 01:48 | 14:28 | 03:03 | 15:43 |

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo